# avtoftaðari bygd





- Rabarburnar plaga at vera góðar, sigur Eilef

Mynd: Høgni Thomsen



»Tað ið ungur nemur, hann gamal fremur«. Ein smádrongur er komin norður til Múla at hjálpa til í rabarbugarðinum

Mynd: Høgni Thomsen



Tað gongur skjótt at taka rabarburnar, tá manningin er góð

Mynd: Høgni Thomsen

ing komin í: Tað tóktist vera ógjørligt at fáa lærara til vega.

### Eingin lærari tøkur

Tað átti annars at verið so einfalt hjá Eilefi at fari í skúla, tí hesin varð millum annað hildin í barnaheimi hansara.

Hansara skúlavegur hevði tí ikki verið langur, men umstøðurnar lagaðu seg so óhepnar, at lærari fekst ikki til Múla hetta árið – og heldur ikki tað næsta!

Hetta ávirkaði sum vera man skúlagongdina hjá Eilefi so mikið, at hann ikki fór í skúla fyrrenn hann var um níggju ára gamal.

- Hetta var í 1942, so eg var rættiliga gamal at fara í skúla á fyrsta sinni, sigur Eilef hugsunarsamur.

Skipanin við lærarakreftunum um hetta mundið var hon, at lærarin skifti at undirvísa børnunum á Norðtoftum – ella í Toftum sum tey gomlu siga – og í Múla.

- Hann plagdi at vera hjá okkum í tvær vikur og fór síðani til Norðtoftir í tvær vikur, sigur Eilef.

### Á fjall við hornum

Hóast ein skuldi trúð at smádreingirnir í eini so fjarskotnari bygd mundu keða seg í frítíðini, mundi tað ikki vera so nógv øðrvísi enn aðrastaðni.

Hóast sambandið við umheimin var lítið, fyri ikki at siga avmarkað, treyt teimum hvørki leikur ella vinarlag.

- Vit plagdu at spæla nógv við horn, minnist Eilef aftur á barnadagar sínar.

Hetta var ein leikur, sum kortini hevði við gerandisdagin hjá teimum vaksnu at gera:

Hornini vórðu rikin í rætt eins og eitt seyðafylgi, tá tann tíðin var. Til aðrar tíðir fóru smádreingirnir í tað »lokala« feitilendi við teimum.

- Og tá menninir fóru á fjall, vóru vit dreingirnir sjálvandi við, greiðir Eilef frá.

Teir fylgdu eisini við, tá menn fóru til útróðrar.

### Avtofting

Í sínum langa lívi hevur Eilef sæð gongdina í menningini – og seinni avtoftingini av føðibygd síni.

Hagtølini vísa, at fyri 22 árum síðani búðu einans átta sálir í bygdini, men so byrjaði av álvara at ganga afturá hond.

Sjey ár seinni var fólkatalið komið niður á trý og er tað enn, hóast talið eitt skiftið vaks eitt sindur. Alt hetta hendir, hóast bygdin eisini fekk vegasamband við umheimin í hesum tíðarbili.

Júst hetta við vegasambandinum hevur eisini undrað Eilef eitt sindur. Ein skuldi trúð at góð viðurskifti við samferðsluni vóru ein trygd fyri menning í einum øki.

Soleiðis er kortini ikki allastaðni. Tað er Múla eitt sera gott dømi um.

– Í dag hava øll bil. Og tí kundu fólk saktans búð her norðuri í Múla og arbeitt aðrastaðni.

- Men vit kunnu bara staðfesta, at soleiðis er støðan altso ikki, sigur Eilef.

**Hornini vórðu rikin í rætt eins og eitt seyðafylgi, tá tann tíðin var. Til aðrar tíðir fóru smádreingirnir í tað »lokala« feitilendi við teimum**